# rofonina









*Dagfinn Joensen, Arnold Ludvig og Rógvi á Rógvu eru nakrir av tónleikarunum, sum seinastu mánaðirnar hava verið í upptøkuhølunum hjá Studio Oyravox í Nólsoy*

men Terji roknar við, at hesar fløgur – ella dvd'ir – verða vístar í brúdleypunum, og at Studio Oyravox á tann hátt kemur inn í myndina.

So tað hava verið nógvar stuttligar løtur í Oyravox, síðan studio'ið av álvara kom upp upp í snúningar í november mánaði í fjør.

Eitt, sum var rættiliga forkunnugt, var tá Kári P. var her úti og tók upp. Tað var fyrstu ferð hann var í studio í eini sekstan ár – ella síðani 1991, haldi eg, sigur Terji Rasmussen.

Og fólki dámar væl at koma út til Nólsoyar at taka upp.

- Fyrr kundi tað vera eitt sindur trupult, men síðani Ritan fór at sigla hvørt kvøld klokkan 22, liggur sera væl fyri, og fólki dámar ógvuliga væl at koma út her, sigur Terji.

Teir hava eisini roynt at hugna um sum frægast, ikki bert inni, men eisini úti. Neyðugt var sjálvandi at leggja miðstøðuhita inn, og teir hava eisini klætt bygningin uttan. Hetta hevur latið seg gjørt á bíligasta hátt, tí partvís eru tveir av makkarunum elektrikarar, og partvís eru teir sera fittir í hondunum annars. So teir hava heilt sloppið undan arbeiðslønum.

- Vit eru rættiliga bíligir eisini í mun til onnur studio. Tað er nevniliga ein av fyrimununum við at búgva í Nólsoy. Tær nýtist ikki líka nógv reint fíggjarliga, tá tú býr úti á bygd, sigur Terji.

Men Terji situr ikki við svøri á trónuni og verjir sítt kongaríki. Tvørturímóti, so samstarvar hann við fleiri síður.

- Eg havi arbeitt rættiliga nógv saman við Jónas Bloch Danielsen, sum hevur ferðast nógv runt við Teiti. Hann er forrestin her úti í hesum døgum og ljóðblandar eina fløgu hjá gospelbólkinum ProClaim.

Haraftrat hevur hann gott samband við dugnaliga danan Flemming Hansson. Teir hava gjørt avtalu um, at um kundar taka upp í Oyravox, so kunnu teir mixa hjá Flemming væl bíligari enn annars.

- Hann hevur lært meg eina rúgvu. Men annars havi eg tikið nøkur skeið og dúvi so sjálvandi upp á tær royndir, sum eg sjálvur havi gjørt mær við at hava verið í studio, sigur Terji Rasmussen.

Men hvussu við honum sjálvum? Hevur hann nú heilt lagt gittara og mikrofon á hillina?

- Nei. Eg havi fleiri løg liggjandi – og tá einki annað er at gera, so spæli eg mær við tí. Eg veit ikki nær nakað av mær sjálvum kemur, men tað kemur heilt vist einaferð, sigur Terji.

So sjálvt um hann nú fyri tað mesta er at finna aftan fyri mikrofonina, so hava vit ikki hoyrt tað seinasta til Terja Rasmussen sum sangara.